## Eingin sjampanja til vinnararnar

Nýggja gólvið í høllini tolir ikki vætu, og tí heitti HSF á finaluluttakararnar um ikki at sproyta við sjampanju, tá steypasigurin skuldi feirast. Hetta varð gjørt greitt, longu undan kvinnufinaluni. Gólvið, sum varð lagt á til endamálið, tolir ikki serliga væl vætu, og tí mugu sjampanjusproytini bíða til eina aðru ferð.



## El Banna aftur í Frem

Wassim El Banna skal nú aftur spæla við 1. Deildarfelagnum Frem, har eisini Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen spæla. El Banna hevur áður spælt í Frem, og hann hevur eisini verið liðformaður í felagnum. Frem og El Banna hava gjørt eina avtalu fyri eitt hálvt ár í fyrstu syftu, og El Banna fegnast um at sleppa aftur at spæla fyri felagið, sum hann kennir so væl, og har fólk kenna hann.

# Kvinnufinalan




*Stjørnan steypavinnari hjá kvinnum. Aftan frá vinstru: Henrik Gerster, venjari, Durita Ljósstein, Durita Christophersen, Simona Petersen, Durita Mikkelsen, Diane Møller, Anna Kristina Samson, Bára S. Klakstein, Kristina Griksaite, Maria við Neyst, Joan Midjord Djordjevic, Sylvan Jakobsen, hjálparvenjari.*
*Framman frá vinstru: Edith Hansen, Maria Ziskason, Una Olsen, Judith Hansen og Ella Petersen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



## Máttu vera konsentreraðar

**Tað ráddi um at halda fast í uppskriftini, segði Simona Petersen, tá hon saman við liðfeløgunum kundi fegnast um sigurin**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Tað snýr seg alt um at vinna. Fagnaðurin á Stjørnu-kvinnunum var eisini ovurstórur, tá tær við sigri á Tjaldri høvdu ognað sær stóra steypið, men eina løtu sá tó ikki heilt so gott út.**

**Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki var tað Tjaldur, sum hevði hug at seta seg á dystin, men hetta skapti ongan tíð nakran ótta á liðnum hjá Stjørnuni, segði Simona Petersen eftir dystin.**

**- Eg haldi ikki, at vit vóru bangnar. Men vit vistu, at tað fyrst og fremst ráddi um hjá okkum at halda fokus. Fyrstu løtuna av dystinum framdu vit eisini fleiri mistøk enn tær, og tá løgdu tær seg eisini framum. Men tað koppar til okkara fyrimun, tá vit minka talið av mistøkum í spælinum.**

***Eru tað kanska fleiri royndirnar hjá tykkum, sum gera, at tit tá minka um talið av mistøkum?***

**- Kanska eitt sindur. Tað eru sjálvandi ikki bara royndirnar, sum avgera alt, men tær hava nokk sítt at siga, sigur Simona Petersen.**

***Tá tit nú fara upp eftir steypinum, eiga tit tað samstundis til ognar. Er tað nakað, sum tit eisini hava hugsað nógv um?***

**- Tað sigur heilt nógv. Tað eru ikki nógv lið, sum vinna hetta til ognar, men nú verður tað so standandi í KÍ-høllini, og tað fegnast vit sjálvandi um, sigur Simona Petersen.**




*Tað tykist ikki, sum tað er konsentratiónin, sum vantar á myndini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*